# KENDUR VB VENJARI BRÁDLIGA DEYÐUR



**ANDLÁT** Tað er ein stórur missur hjá VB, at dugnaligi venjarin, sum gjørdi kvinnuliðið til besta liðið í Føroyum eitt skifti og sum aftur skuldi venja liðið aftur í ár, brádliga doyði í gjár í bestu árum

Áki Bertholdsen

– Alt steðgaði upp í Vági í gjár.

Egil Steintórsson, formaður í hondbóltsdeildini hjá VB, sigur, at tað kom ómetaliga dátt við, tá ið tey í gjár fingu deyðsboðini av Aivaras Daugis, úr Litavia, sum er vælkendur venjari hjá felagnum í Vági.

Hann var í bestu árum, nú hann doyði, tí hann var bara 39 ára gamal.

Hann hevur áður verið venjari hjá VB í eini fýra ár og onkur av hesi árinunum gjørdi hann felagið til besta lið í landinum við tað, at tey vunnu bæði FM og steypakappingina.

Eftir ein steðg kom hann aftur til Vágs í vár og var venjari hjá VB teir síðstu dystirnar í undanfarnu kapping við tí fyri eyga at halda fram í starvinum hetta kappingarárið.

Hann skuldi sostatt koma aftur til Vágs í næsta mánað at verða venjari hjá VB í vetur og við sær skuldi hann hava tveir leikarar.

## Stórur missur

Egil Steintórsson sigur, at í løtuni dugir hann ikki at siga, hvat VB nú fer at gera og hann veit heldur ikki, um spælararnir, koma kortini.

Men støðan altso tann beint nú, at VB hevur ongan venjara í vetur.

– Tá ið tann ringasti skelkurin hevur lagt seg um nakrar dagar, fara vit í VB at tosa saman um, hvat vit nú skulu gera.

Men hann staðfestir, at tað er ein stórur missur fyri VB, at Aivaras Daugis er farin.

– Hann hevur gjørt eitt kanónarbeiði fyri VB sigur hann og leggur afturat, at tað eru eisini nógvir av teimum ungu spælarunum í dag, sum fyri ein heilt stóran part kunnu takka honum fyri tað, teir duga á vøllinum, sigur hann.

aki@sosialurin.fo

## Øgiliga gott fólk

- Tað var ein skelkur, tá ið telefonin ringdi klokkan átta í gjáramorgunin og vit fingu deyðsboðini av venjaranum.

Bogi Mortensen, sum hevur staðið á odda fyri hondbóltinum hjá VB í fleiri ár og hann kennir Aivaras Daugi sera væl og tað kom honum ómetaliga dátt við, tá ið deyðsboðini komu.

Og hann hevur bara alt gott at bera litaviska venjaranum hjá VB.

- Hann var eitt øgiliga gott fólk, hugsaði nógv um onnur og var serstakliga væl lýddur í Vági, sigur hann.

Sjálvur treivst Aivaras Daugis eisini sera væl í Vági og ímillum vágbingar og hann kendi hvørt mansbarn.

So væl treivst hann, at hann í eini blaðgrein kallaði Vág fyri sítt annað heim.

Eisini sum venjari hevur Bogi bara alt gott at bera honum.

- Hann var ein sera góður og nærlagdur venjari, sum fór eftir úrslitinum. Hann dugdi sera væl at lesa spælið og hevði gott taktiskt forstáilsi.

Hann dugdi eisini ómetaliga væl at fara við spælaranum og megnaði altíð at fáa tað besta burtur úr hvørjum einstøkum spælara.

Bogi Mortensen sigur, at sum hann hevur skilt, komu deyðsboðini av Aivaras Daugis eisini sera dátt við hjá hansara næstringum, tí hann hevur ikki verið sjúkur.

- Hann hevði verið eitt sindur illa tilpass um vikuskiftið, men var farin at ganga sær ein túr í gjáramorgunin, tá ið hann brádliga small deyður niður.

Hann giftust fyri nøkrum fáum árum síðani og eftir hann sita kona og tvey børn, sum eru fimm og tvey ára gomul.



**ANDLÁT**

*Tað kom ómetaliga dátt við í Vági í gjár, tá ið tey frættu, at dugnaliga og sera væl lýddi hondbóltsvenjari teirra, var brádliga deyður*